

## Tofta skúli

Heygsveg 28 · FO 650 Toftum

Tlf. 447332 · fax 449532 · t-postur: tof@skulin.fo

## Lærarastørv og størv sum stuðul í Tofta skúla

**Hesi størv verða lýst leys til setanar frá 1. august 2008 at rokna:**

- **3 tíðaravmarkað lærarastørv, fulla tíð** fyri millum annað lækkað tímatal og serligan tørv
- **1 tíðaravmarkað lærarastarv uml. 20 t/v** endaliga tímaáseting av hesum starvi verður ásett eftir 1.september 2008
- **1 tíðaravmarkað lærarastørv, fulla tíð fyri lærara í barnsburðarfarloyvi skúlaárið 2008/2009**
- **4 tíðaravmarkað størv sum stuðul** 3 størv eru 24 t/v og 1 starv er 8 t/v talan er um stuðul til næmingar, sum hava serligan tørv

**Skúlanum tørvar lærarar, ið kunnu átaka sær:**

- føroyskt og týskt í framhaldsdeildini
- ítrótt í grund- og framhaldsdeildini
- føroyskt, danskt og enskt í grunddeildini
- handverk og list í grund- og framhaldsdeildini
- serligan tørv

**Vit vænta at tú:**

- ert fyrikomandi, umhyggin og engasjerað/ur
- ert fús/ur at taka á teg tær uppgávur sum eru í skúlanum
- í samstarvi við leiðslu og starvsfelagar vil vera við til áhaldandi at menna skúlan

**Førleikakrøv:**
Læraraútbúgving og linjulestur ella samsvarandi førleika í nevndu lærugreinum/lærugreinaøkjum. Ynskiligt er, at umsøkjarar hava starvsroyndir í fólkaskúlanum.

**Lønar- og setanartreytir:**
Lærarastørvini verða sett sum sáttmálasett størv, uttan so at tey, ið sett verða, eru tænastumannasettir lærarar frammanundan.

Lærarastørvini verða lønt sambært avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálaráðið.

Størvini sum stuðlar verða lønt sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Fíggjarmálaráðið.

**Umsóknir:**
Umsóknir við c.v. og avriti av prógvum skulu vera skúlastjóranum í hendi **í seinasta lagi mikudagin 18.juni kl. 12.00.**

Nærri fæst at vita um størvini frá Maritu Dalsgaard, skúlastjóra á tlf. 447332 & 747765.

**Tofta skúli** hevur komandi skúlaár uml. 196 næmingar í 1. – 10.fl. og um 20 lærarar. Tú kanst lesa meira um okkum á heimasíðuni www.skulin.fo/tof/

SANDAVÁGS KOMMUNA

# NÁMSFRØÐINGAR SØKJAST

Sandavágs kommuna søkir eftir námsfrøðingum til størv í Sóljugarði at byrja 15. august, ella eftir avtalu.

Um námsfrøðingar ikki søkja, verða hjálparfólk fyribils sett.

Talan er um 30-40 tíma størv í vøggustovu ella barnagarðsstovu. Møguleiki er eisini fyri at fáa serligar námsfrøðiligar uppgávur.

Stovnurin er í 5 eindum við vøggustovu og barnagarði. Stovnurin er vanliga opin frá kl. 7.30 til 17.00.

**Í dagliga arbeiðnum leggja vit m.a. stóran dent á:**

- Trivnaðin hjá starvsfólkum og børnum
- At seta okkum inn í støðuna hjá tí einstaka barninum
- At skapa álit og tryggleika, bæði fyri foreldur og børn
- At hava gott samstarv bæði við starvsfólk og foreldur

**Hetta krevur:**

- At tú ert fyrikomandi og erlig/ur
- At tú dugir at arbeiða sjálvstøðugt og ábyrgdarfult í samráð við børn og starvsfelagar
- At tú ert nærverandi og dugir at lurta
- At tú dugir at síggja møguleikar heldur enn avmarkingar
- At tær dámar at verða úti í øllum veðri
- At tú vil verða við til at menna Sóljugarð

Vit hava góðar umstøður, bæði uttandura og innandura.

**Lønarviðurskifti**
Lønin er sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Føroya kommunala Arbeiðsgevarafelag (www.kaf.fo). Námsfrøðingurin fylgir lønarstigunum frá 11 til 18 og hjálparfólk fylgja lønarstigunum frá 1 til 7.

**Meira fæst at vita**
Um størvini við at venda sær til Helenu Skarðenni, leiðara. Á telefon 226610 / 333930 lok. 10

**Umsóknir**
Saman við upplýsingum um royndir og møguligum viðmælum skulu vera Sóljugarði, Hammersheimbsvegur 9, 360 Sandavágur, í hendi í seinasta lagi 30. juni 2008. Viðmerk á brævbjálvan: »Námsfrøðingur«.

Sandavágs Kommuna

www.sandavagur.fo

Hammershaimbsvegur 1 · FO-360 Sandavágur
Tel. +298 332 470 · Fax. +298 333 470
sandavagur@sandavagur.fo

Vágs Kommuna

# Lærarastørv í Vágs skúla

## lýst leys til setanar frá 1. august 2008

- 2 lærarar í fast starv frá 1. august 2008.
- 2 lærarar í tíðaravmarkað starv skúlaárið 2008/2009
- 1 lærari í tíðaravmarkað parttíðarstarv skúlaárið 2007/2008 (timatalið til hetta starv verður endaliga ásett 1. sept. 2008).
- 1 lærari í tíðaravmarkað starv skúlaárið 2008/2009 fyri lærara í barnsburðarfarloyvi. Fyri eftirløntar lærarar, lærara í farloyvi, lækkað tímatal, stuðulstímar og avlopstímar

**Søkt verður eftir lærarum, sum**

- undir ábyrgd leiðslunnar og í samstarvi við lærarar skúlans skulu undirvísa og taka lut í dagliga arbeiði skúlans
- duga at samstarva og eru fyrikomandi
- eru fúsir at taka á seg tær uppgávur, sum eru í skúlanum
- eru stundisligir og nærlagdir

**Haraftrat skulu lærararnir hava førleika at átaka sær eina ella fleiri av hesum lærugreinum:**

- Alis./evnafrøði, rokning/støddfrøði og enskt í framhaldsdeildini.
- Føroyskt, enskt, søgu, náttúru og tøkni, lívfrøði, handarbeiði, tilevning, kristni, ítrótt, støddfrøði og serligan tørv í barnaskúlanum.

**Førleikakrøv:**
Læraraútbúgving og linjulestur ella samsvarandi førleika í nevndu lærugreinum.

**Lønar- og setanartreytir:**
Størvini verða lønt í lønarflokki 18.1 – 27.4 sambært avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálaráðið.

**Umsóknir**
Umsóknir við c.v. og ljósriti av prógvum og møguligum viðmælum skulu vera skúlastjóranum í hendi í seinasta lagi Tórsdagin 19. juni kl 10.00
Nærri kunning um størvini fæst við at ringja til Óla í Hjøllum, skúlastjóra, á tlf. 373192 ella 222896

# Sp/f Plan

Søkt verður eftir royndum maskinførara.
Koyrikort krevst.
Byrjað skjótast gjørligt

TLF. 21 49 37

# Bilførari søkist

Søkt verður eftir bilførara.
Skal hava stóra koyrikortið.

**H.H. Trans Sp/f · 212708**

# Bilur til Sølu

Nissan Almera 2,2 Diesel
frá januar 2002
koyrt 250.000 km.

